kortini ikki at uppliva stóra sigurin hjá tí frælsa heiminum. 10. mai í 1940 legði hann frá sær, sum forsætisráðharri, og longu 9. november sama árið doyði hann, 71 ára gamal. Av summum søguskrivarum verður hann hartaður fyri at vera ov eftirgevandi yvirfyri Hitler í 1938, tá hann gekk við til, at Týskland kundi taka Kekkoslovakia. Chamberlain verður vardur av øðrum søguskrivarum, at hann gav Stórabretlandi meir enn eitt ár eyka at fyrireika seg í, og tað var undanmaðurin, Stanley Baldwin, sum ráddi fyri borgum fram til 1937, sum í stóran mun hevði avvápnað Stórabretland, so landið ikki var ført fyri at føra kríggj. Winston Churchill, sum gjørdist forsætisráðharri aftaná Chamberlain vardi hann, og segði, at Chamberlain var ein rætthugsandi og friðarelskandi maður, og at hann í bestu meining handlaði út frá hesum.





*Neville Chamberlain og Adolf Hitler*







Soleiðis handfer tú

# TRUPUL FÓLK



Tilmeldingarfreist
14. september 2009

**Tá tú hevur** við fólk at gera, slepst ikki undan, at tú eisini møtir truplum fólkum. Summi eru trupul í eitt tíðarskeið, onnur eru tað altíð. Tað kann vera ein starvsfelagið ella ein kundi.

**Trupul fólk kunnu**
- vera óbehagilig, ill og óhøflig
- grenja og seta órímilig krøv
- klaga um hvat sum helst
- geva tær skuldina fyri nakað, tú ikki hevur ávirkan á

**Diskussiónin koyrir** kanska runt í høvdinum og dagurin hjá tær er oyðilagdur. Við hvørt fyllir tað alt ov nógv. Tú følir teg órættvíst behandlaðan, tí tú gjørt eitt abeiði, sum ikki verður virt. Tá tað er ringast kanst tú missa svøvnin.

**Gleð teg** til eina tætt stúgvaða skrá, fulla av góðum ráðum og teknikkum um, hvussu tú skalt handfara truplu fólkini á arbeiðsplássinum.

**Fá innlit í** ymiskar persónstypur og í teirra atburð. Lær ítøkilig amboð og hættir, sum gera teg føra at greiða tær orrustir, sum koma, har menniskju hittast.

**Brellbitar úr skránni**
*- full skrá á www.synergi.fo*

- Hvussu bert tú teg at, um tú kennir teg álopna?
- Hvat gjørt tú, tá fólk klaga og seta órímilig krøv?
- Hvussu skalt tú gera, tá tú missir tamarhaldið?
- Hvussu loysir tú gamlar ósemjur?
- Lær at seta mørk
- Lær at takla atfinningar
- Legg dent á tína persónligu megi

**Tú fert heim** við størri megi og við ítøkiligum hættum og amboðum at loysa støður, har naggatódn er komin í. Og við betri førleika at varðveita friðin í spentum støðum.

**Skeiðið er fyri teg** sum dagliga hevur við fólk at gera. Eitt nú fólk, ið arbeiða við kundaavgreiðslu, leiðarar, starvsfólk innan almanna- og heilsuøki, handilsfólk, innan ferðavinnuna, starvsfólk á dagstovnum, starvsfólk í stressaðum arbeiðsumhvørvi v.m.

**Tilmelding** og les meira á tel. 322355 ella á www.synergi.fo.

**5. oktober 2009**
**á Hotel Føroyum**

Skeiðleiðarar



**LARS KLINGERT**
*- miðlafólk og ráðgevi í samskifti*

**SEBASTIAN NYBO**
*- ráðgevi í arbeiðssálarfrøði og stjóri í SEB gruppen A/S*

**EFTIRMETING**
Best umtókta skeið hjá Confex
(stór skeiðsfyritøka)

"Eindømi! Stutt, greitt, skorið til beinið og ógvuliga stuttligt. Eg havi fingið nógv nýtilig uppskot til loysnir."

*Hanne Skovsted, skrivstovustjóri, Statens Luftfartsvæsen*

Synergi

**Les meira og tekna teg á www.synergi.fo ella ring 32BELL (322355) / 22RING (227464)**